# Filadelfia

*„Himmal á jørð“*




Luk. 23,45-46: *Forhangið í templinum skrædnaði eftir miðjuni. Og Jesus rópti við harðari rødd: „Faðir! Í hendur Tínar gevi Eg anda Mín.” Táið Hann hetta hevði sagt, andaðist Hann.*

Hetta og tað, at Jesus varð reistur upp frá deyðum, er tað ultimativa viðvíkjandi Jesu jarðarlívi; tað at Jesus doyr, og at forhangið skrædnar, er prógv um tann endaliga sigurin, sum Jesus vann okkum. Og hetta verður so staðfest í Ápostlasøguni 2, tá Heilagi Andin verður útheltur. Heilagi Andin er alt fyri okkum, sum trúgva. Hann er talsmaðurin, sum er komin í stað Jesusar. Hann býr í okkum, og vit kunnu eisini verða doypt í Heilaga Andanum. Eitt av seinastu orðum Jesusar var: Tit skulu fáa kraft, tá Heilagi Andin kemur yvir tykkum. Og við Nikodemus segði Jesus: Verður ein ikki føddur av nýggjum, kann hann ikki síggja ríki Guds! At føðast av nýggjum er at trúgva og at verða frelstur. Tá vita vit, at vit kunnu sleppa at síggja ríki Guds. Tað næsta er at Heilagi Andin kemur yvir okkum. Tá fáa vit kraft til at liva í eini dimensjón, sum vit ikki kunnu skapa av egnari megi ella hugsan.

Es. 60,1 sigur: **Statt upp, verð ljós! Tí ljós títt er komið, og dýrd Harrans rennur upp yvir tær**. Dýrdin er so týdningarmikil, tí tað var júst dýrdin, sum Ádam og Eva mistu, tá tey fullu í synd. Og einki menniskja kundi nakrantíð vinna dýrdina aftur, uttan menniskjasonurin Jesus. Hann vann dýrdina til okkum, og Heilagi Andin er dýrd Harrans íbúgvandi í lívi hansara sum trýr.

Tað er nokk so hugvekjandi at vita, at tá alt var fullgjørt á Golgata, og Jesus var uppstaðin og farin til Himmals, tá broytti tað ikki nakað stórvegis millum Ápostlarnar, og tey sum vóru saman við teimum. Ikki fyrr enn Heilagi Andin kom yvir tey! Tá broyttist alt – halleluja. Tí hava vit fyri neyðini at umtala Heilaga Andan, søkja Heilaga Andan og at liva í Heilaga Andanum. Tað er nóg mikið fyri mína frelsu at taka ímóti Heilaga Andanum við trúgv til frelsu, men tað broytir ikki so nógv uppá mítt nærumhvørvi. Andin má koma yvir okkum, og vit mugu søkja at liva dagliga í tí kraftini, sum Jesus lovaði okkum, og sum Ápostlarnir og hini fingu lut í. Mær dámar væl sangin, sum yvirskriftin vísir á. Dýrdin kom niður, fylti mína sál; grøddur eg varð við krossins kærleiksbál. Tað er ein sterkur vitnisburður at eiga, og eitt ríkidømi at vísa fram, sum talar um, at frelsan ikki er bert orð, men kraft, sum broytir dagligdagin; sum skapir gleði, tryggleika og frið undir øllum umstøðum

At verða fylt og doypt við Heilaga Andanum skapir ein dagligan longsul eftir tí Himmalska, eftir at liva í tí yvirnatúrliga. Tá er tað ikki nóg mikið at vera frelst og ganga á møti. Eitt lív í Heilaga Andanum broytir alt – og tað broytist innanífrá. Tá aktivera vit kelduna, sum Jesus tosar um í Jóh. 7,38: **„Tann, ið trýr á Meg, úr lívi hansara skulu, sum skriftin hevur sagt, renna streymar av livandi vatni!“** Hetta livandi vatnið broytir alt og ger allan munin bæði persónliga – fyrst – og eisini fyri okkara umhvørvi.

Í hesum mánaðinum fara vit at hava hvítusunnustevnu, og mær tykir, at hvítusunnan er av størsta týdningi fyri okkum øll. Eg veit at nógvastaðni í samkomum verður diskuterað, um ein eigur at nýta tungutalu og náðigávur alment, men eg kann ikki síggja nakað alternativ. Tí nýta vit ikki Andans gávur, so eru tað okkara egnu førleikar, sum mynda okkara samkomulív. Vit hava fingið lut í tí, sum er omanífrá – Himmalin – og vit hava sooo brúk fyri at liva í tí himmalsku tilveruni, so vit ikki verða formað av tíðarandanum, sum er í heiminum – eisini í Føroyum – til eina og hvørja tíð. Vit kunnu hava alskyns meiningar um kríggið í Ukraina, Miðeystri o.s.fr., men tað er bara Heilagi Andin, sum kann geva kraft og vón til nakað sum er betur og størri enn tað, sum er í heiminum.

Eg vil fegin eggja okkum øllum til at verða við til hvítusunnustevnuna, sum í ár verður hildin í Skálavík. Latið okkum verða brennandi í Andanum, og søkja felagsskapin og draga Himmalin niður yvir okkum. Latið okkum venja hvønn annan í at liva eitt Heilaga Andans lív, so tað livandi vatnið flýtur frítt okkara millum.

*tj*

# MAI 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudagur | 1. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði** |
| Leygardagur | 4. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 5. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári<br>Ábyrgd/Leiðari: Mariann<br>Lovsongsleiðari: Tummas, bólkur I<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Regin<br>Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 6. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May |
| Týsdagur | 7. | Kl. 20.00 | **Hugnakvøld fyri kvinnur og ungar gentur**<br>Ábyrgd/leiðari: Margreth og Linda |
| Leygardagur | 11. | Kl. 10.00 | **Hugnaløta við Hallur**<br>**Reingerð:** Margreth og co. |
| Sunnudagur | 12. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Alex<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 13. | Kl. 19.00 | **Felags bønarmøti í Hoyvík**<br>Ábyrgd/leiðari: Immanuel |
| Mikudagur | 15. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði v. døgurða** |
| Fríggjadagur | 17. | Kl. 19.00 | **Hvítusunnustevna í Sandoy**<br>Talari: Hjørdis H. Petersen |
| | | Kl. 21.00 | **Ungdómsmøti** |
| Leygardagur | 18. | | **Reingerð:** No-omi og co. |
| | | Kl. 19.00 | **Hvítusunnustevna í Sandoy**<br>Talari: Símun P. Jacobsen |
| Sunnudagur | 19. | Kl. 11.00 | **Hvítusunnustevna í Sandoy**<br>Talari: Poli Jacobsen |
| | | Kl. 17.00 | **Lovsongsløta** |
| Leygardagur | 25. | | **Reingerð:** Merlie og co. |
| Sunnudagur | 26. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti – innsavning til húsið** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Ása L.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Einar Joensen<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 27. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Mikudagur | 29. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði** |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

# Hvítusunnustevna í Sandoy

Fríggjadagin 17. mai kl. 19.00 møti, har Hjørdis H. Petersen talar
Kl. 21.00 verður ungdómsmøti
Leygardagin 18. mai kl. 19.00 møti, har Símun Jacobsen talar
Sunnudagin 19. mai kl. 11.00 møti, har Poli Jacobsen talar
Kl. 17.00 verður lovsangsløta

Sunnudagin hvítusunnudag, verður døgurði, neyðugt er at tekna seg, við at senda sms til Annu-May á tlf. 284821 ella við at ringja til skrivstovuna á tlf. 234828.

Í samband við hvítusunnustevnuna, ber til at leiga kamar í Deplinum í Skálavík, kostnaðurin er kr. 300,- pr. nátt. Um tit ynskja at bíleggja kamar, kann hetta gerast við at senda sms til Annu-May á tlf. 284821 ella við at ringja til skrivstovuna á tlf. 234828.

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*